-3 (3-2):

# sta brakinum




*HB-verjan var fleiri ferðir um ein háls, tá ágangandi KÍ-leikararnir settu kós oman móti málinum*
*Mynd: Bárður Lydersen*

Mistøkini frá báðum pørtum viðførdu eisini, at seinni hálvleikur gjørdist nakað væl meira varliga spældur enn fyrri. Fyrstu løtuna tóktist tó, sum hevði HB eina veruliga yvirvág, men hendan komst helst eins nógv av, at KÍ hevði hug at bakka ov nógv. Tá hetta varð rættað upp, kom KÍ fleiri ferðir nær góðum møguleikum, og tað endaði eisini við, at teir skoraðu eftir horna. Eitt mál, sum í veruleikanum avgjørdi dystin.

HB royndi seg fyri tað mesta við longum bóltum niðan móti álopinum, men hetta var tó barnamatur fyri vælvaksnu KÍ-verjuna. Einstakar ferðir var vandi tó á ferð, men í tveimum førum blokeraði Ovi Nysted væl. Móti dystarloki fingu gestirnir brotsspark, sum teir eisini gagnnýttu, men hóast KÍ seinastu minuttirnar spældi í undirtali, so eydnaðist ongantíð at fáa eitt veruligt trýst á bláa málið hesa løtuna.

Tí megnaði heimaliðið eisini uttan teir heilt stóru trupulleikarnar at halda fast um leiðsluna, og so eru teir klárir til longu gongdina móti 27. og seinasta umfarinum.

## FAKTA UM DYSTIN

**KÍ-HB 4-3 (3-2)**
0-1: Hans á Lag, 2.
1-1: Erling Fles, 5.
1-2: Tór-Ingar Akselsen, 11.
2-2: Atli Danielsen, 21.
3-2: Erling Fles, 41.
4-2: Hjalgrím Elttør, 76.
4-3: Tór-Ingar Akselsen (br.), 88.
**KÍ:** Mathias Samuelsen – Leon Bjartalíð, Ove Nysted, Niclas Niclasen, Eyðun Klakstein – Arnold Joensen (Jan Andreasen, 88.), Atli Danielsen, Høgni Madsen, Heðin á Lakjuni – Hjalgrím Elttør (Julian Samuelsen, 86.), Erling Fles (Kristoffur Joensen, 80.)
**GK:** Atli Danielsen, 30.
**RK:** Ovi Nysted, 88.
**HB:** Bárður Johannesen – Hans á Lag, Jóhannis Joensen, Rasmus Nolsøe, Janus M. Joensen – Kári Nielsen, Rúni Nolsøe, Emil N. Leifsson (Svenn Jacobsen, 68.) – Jákup á Borg, Páll M. Joensen (Rókur Jespersen, 59.), Tór-Ingar Akselsen
**Dómari:** Súni Johansen: Kundi í løtum verið meira avgjørdur, men sum fyrsti dysturin var talan um eina góða byrjan, har dómarin hevði gott samband við spælið.



*Atli Danielsen hevur javnað til 2-2, og frøin er stór á viðleikarunum*
*Mynd: Bárður Lydersen*

## Málini

**0-1: Hans á Lag, 2.**
Tað tykist ikki serliga vandamikið, tá HB sendir horna innfyri, men ungi KÍ-málverjin fær ikki boksað burtur, og so hevur Hans á Lag lætt spæl til at leggja meistararnar framum.

**1-1: Erling Fles, 5.**
Hjalgrím Elttør verður sendur avstað í vinstru. HB verjan er als ikki komin upp á pláss, og tá Hjalgrím sendir innfyri, er Erling púra blankur heilt inni undir málinum.

**1-2: Tór-Ingar Akselsen, 11.**
Av miðjum vølli dregur Tór-Ingar seg leysan av tveimum klaksvíkingum. Komin móti brotsteiginum skjýtur hann, og tá skotið verður avrættað, fær Mathias ikki tveitt seg teir neyðugu sentimetrarnar eyka.

**2-2: Atli Danielsen, 21.**
HB missir bóltin av umkast dómi, og tá bólturin eftirfylgjandi verður sendir innfyri, eru markeringarnar alt ov leysar. Við handara stólpa fær Heðin stútað innaftur, og so kann Atli Danielsen tveita seg fram at stúta bóltin seinasta pettið í meskarnar.

**3-2: Erling Fles, 41.**
Kári Nielsen missur bóltin á miðvøllinum, og so eru klaksvíkingarnari skjótir avstað. Hjalgrím gerst leysur, og tá Bárður bara fær hálvbjargað, er Erling fyrstur á returinum.

**4-2: Hjalgrím Elttør, 76.**
Hornaspark verður sent innfyri úr vinstru. Alt endar við, at Atli fær stútað tvørtur um til ein merkiliga leysan Hjalgrím, sum úr trimum metrum langar bóltin í kassan.

**4-3: Tór-Ingar Akselsen (br.), 88.**
HB fær eina seinastu vón, tá Ove Nysted má brúka hondina at bjarga skotinum frá innskifta Svenn Jacobsen. Brotssparkið sendir Tór-Ingar flatt í netið, hóast Mathias er sera nær við at bjarga.

# Dýr mistøk

Eftir dystin í Klaksvík fingu vit orðið á Jóhannis Joensen, sum nú aftur er at síggja í HB-verjuni, eftir at hann tey bæði seinnu árini hevur leikt við ávíkavist FS Vágum og B36.

Men hóast hann soleiðis er komin aftur til felagið, har hann hevur verið við til fleiri sigrar, so kundi Jóhannis væl ynskt sær eina betri byrjan enn hana, sum teir fingu í Klaksvík.

– Vit skora tríggjar ferðir í Klaksvík, og tað er sjálvandi gott í sjálvum sær. Men hinvegin, so lata vit fýra mál fara ígjøgnum, og tað kunnu vit so ikki vera nøgdir um. Serstakliga tá talan er um somikið bílig mál, sum hasi, ið teir fáa, staðfesti Jóhannis.

Um sjálvan dystin helt Jóhannis annars, at leikferðin dovnaði nakað, tá liðini gjørdust meira varin.

– Vit byrja vit eini øgiligari ferð, men tá vit fyri steðgin hava fingið trý bílig mál ímóti okkum, so gerast vit sjálvandi meira varnir. Og tað setur seg eisini í sjálvsálitið, tá trý mál fara ígjøgnum. Tí royna vit fyrst og fremst at ansa eftir verjupartinum í seinna hálvleiki, men heldur ikki tað gjørdu vit nóg gott.

Men hóast alt, so helt Jóhannis ikki, at tað var nøkur orsøk at hanga við høvdinum.

– HB tapti jú eisini fyrsta dystin í fjør, og tað gekk mikið væl. Við eini somikið langari kapping, sum talan er um í ár, so er eitt tap heldur ikki eins tungt. Og so var hetta eisini í Klaksvík. Tað vita vit, er ein trupul dystur, og eg haldi eisini, at eg vildi verið nøgdur um ein javnleik her. So nøkur katastrofa er tað á ongan hátt, staðfesti hann.

-jm